UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Keypa útlendskt

Norski matvøruídnaðurin er um at koma í kreppu, tí norsku brúkararnir keypa útlendskar matvørur heldur enn tær norsku. Orsøkin er tann einfalda, at norsku vørurnar eru dýrari, og nú krevur matvøruídnaðurin, at landbúnaðurin skal seta sín rávørupris niður.

Formaðurin í felagnum hjá matvøruvirkjunum sigur við blaðið Aftenposten, at prísmunurin á teimum norsku rávørunum og rávørunum í ES-londunum er himmalhøgur, og at hann bara økist. Tí má okkurt gerast, sigur formaðurin, Roald Guldbrandsen.

Verða fiskavørurnar hildnar uttanfyri, er marknaðarparturin hjá norsku matvøruvirkjunum minkaður tvey prosent seinastu fimm árini, og gongdin fer at standa við, hendir einki, sigur ídnaðurin.

## Fekk skil á

Tað er sjáldsamt, at tað eydnast einum útlendskum vinnulívsmanni at fáa fótin rættiliga fyri seg í Japan, men stjórin í bilverksmiðjuni Nissan, Carlos Chosn, er eitt undantak. Tað vóru minni enn so allir japanar, sum vóru líka fegnir um at fáa ein útlending í ovasta sessin í teirri stóru bilverksmiðjuni, men í dag hevur pípan fingið annað ljóð.

Tað var franska bilverksmiðjan Renault, sum í 1999 sendi Carlos Ghosn til Tokyo. Ørindini vóru at fáa skil á fyritøkuna, sum hetta sama árið hevði 5,7 mia. dollarar í halli. Hetta vildi Renault, sum eigur næstan 40 prosent av Nissan, ikki góðtaka, og sigast má, at leiðslan tók eina skilagóða avgerð, tí longu í fjør hevði Nissan 2,9 mia. dollarar í avlopi.

Hvør Carlos Ghosn er? Jú, hann er føddur í Brasilia, faðirin var libani og móðurin fronsk, hann er útbúgvin í Fraklandi og er franskur ríkisborgari.

# Sharon lovar at skunda undir álopini



*Ein hugsunarsamur Shimon Peres undir liðini hjá Ariel Sharon á stjórnarfundi um vikuskiftið*
*Mynd: Reuters*

**Fleiri hundrað palestinar eru deyðir í bardøgunum seinastu dagarnar. Fleiri ísraelskir hermenn eru eisini falnir.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Higartil hevur ísraelska stjórnin sýtt fyri at slaka fyri amerikanska kravinum um, at stjórnin skal taka herin úr teimum hersettu palestinsku býunum alt fyri eitt. Leygardagin endurtók George W. Bush, forseti kravið um ísraelska afturtøku, og sama kvøld tosaði hann í telefonini við ísraelska forsætisráðharran, Ariel Sharon.

Talsmaðurin hjá Bush segði sunnudagin, at forsetin hevði endurtikið amerikanska kravið um, at Ísrael skal taka seg aftur alt fyri eitt, so tær diplomatisku royndirnar at fáa frið í lag kunnu takast uppaftur.

Sambært talsmanninum hevði Sharon ikki givið lyfti um, at hann fer at geva herinum boð um at taka seg aftur úr teimum palestinsku býunum, sum Ísrael hersetti fyri skjótt fjúrtan døgum síðani.

Ein talsmaður hjá Sharon segði í gjár, at Ísrael fer at skunda undir hernaðarátakið. Talsmaðurin legði afturat, at ísraelska stjórnin skilir amerikansku áskoðanina, men at herurin verður ikki tikin aftur, fyrr enn hann er liðugur við arbeiði sítt.

Amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, kemur til Miðeysturs fríggjadagin. Eygleiðarar halda, at Ísrael bíðar við afturtøkuni, til amerikanski uttanríkisráðharrin kemur.

### Nógvir falnir

Ísraelskar keldur upplýstu í gjár, at einir 200 palestinar eru falnir í samanbrestum, síðani herurin tók seg inn í býirnar á Vestara Áarbakka. Palestinar siga harafturímóti, at talið á falnum er nógv størri. Samnbært palestinskum talsmonnum kravdu bardagarnir sunnudagin 30 mannalív í býnum Nablus.

Ísraelska herleiðslan segði sunnudagin, at ellivu ísraelskir hermenn eru falnir í bardøgum við vápnaðar palestinar, og á einum fundi í stjórnini bað Sharon ráðharrarnar um tøgn eina løtu til heiðurs fyri teir falnu hermenninar.

Keldur í Miðeystri siga, at ísraelski herurin hevur møtt harðari mótstøðu nógvastaðni. M. a. verður sagt, at herurin hevur ikki megnað at taka seg inn í miðbýin í Nablus, tí palestinar gera harða mótstøðu har.

# Hópgravir í Afghanistan

**35 vaksin og børn eru funnin jarðað í trimum gravum miðskeiðis í Afghanistan.**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Talsmenn hjá ST váttaðu sunnudagin, at tríggjar hópgravir eru funnar miðskeiðis í Afghanistan. Hildið verður, at umleið 35 lík liggja í gravunum, og at hetta eru fólk, sum Talibanstýrið beindi fyri. Talan um bæði um vaksin og børn.

ST-talsmaðurin Manoel da Almeida e Silva segði í gjár, at embætismenn hjá ST høvdu verið og hugt at gravunum, sum eru einar 100 kilometrar norðan fyri høvuðsstaðin Kabul. Karim Khalili, sum er ein av leiðarunum í hesum landspartinum, segði, at tær tríggjar gravirnar vórðu funnar á trimum ymsum støðum minni enn 10 kiloemtar frá landspartahøvuðsstaðnum Bamiyan.

Khalili segði seg ikki ivast í, at tað var tað falna Taliban-stýrið, sum beindi fyri fólkunum, sum síðani vórðu jarðað í teimum trimum gravunum.

Úr Norðurlondum:

## Grovari harðskapur

Kvinnurnar, sum leita sær hjálp á kreppumiðstøðunum í Noregi, gerast altsamt yngri og yngri, samstundis sum tað vísir seg, at harðskapurin ímóti kvinnunum gerst grovari og grovari.

Ein spurnarkanning millum 400 kvinnur, sum komu á kreppumiðstøðir í Noregi í fjør, vísir, at tær hava verið fyri grovari harðskapi, enn vanligur hevur verið undanfarin ár. Hetta er ivaleyst eisini ein orsøkin til, at nú verða nógv fleiri menn meldaðir til løgregluna fyri harðskap ímóti kvinnum enn fyrr.

Fyri trimum árum síðani vóru bara millum trý og fimm prosent av kvinnunum, sum leitaðu sær hjálp á kreppumiðstøðunum, yngri enn 20 ár, men í fjør vóru ellivu prosent niðan fyri 20 ár.

## Pengar ímóti krabba

Sum siður er á hvørjum ári gingu fólk sunnudagin hús úr húsi í Danmark og savnaðu pengar til felagsskapin Kræftens Bekæmpelse. 22.000 sjálvboðin kring alt landið savnaðu góðar 25 mió. krónur, sum var góðar tríggjar mió. krónur meiri enn í fjør.

Millum innsavnararnar vóru heilsumálaráðharrin Lars Løkke Rasmussen og undanmaður hansara í ráðharrastólinum, Arne Rolighed, sum eisini er stjóri í Kræftens Bekæmpelse.

## Fleiri til Noregs

Samstundis sum talið á útlendingum, sum søkja um uppihaldsloyvi í Danmar, er minkað nógv, veksur talið í Noregi.

Í Danmark var talið á umsøkjarum í fyrsta ársfjórðingi bara eina helvt av tí, sum tað var í somu mánaðum í fjør, men í sama tíðarskeiði er tað trífaldað í Noregi. Síðani á nýggjárinum hava norsku myndugleikarnir fingið umleið 4.200 umsóknir frá útlendingum um uppihaldsloyvi. Sama tíðarskeið í fjør vóru umsóknirnar 1.542.

KT 2002

VÆLKOMIN TIL KT 2002

í Norðurlandahúsinum og Útvarpshøllini 19.-20. apríl

**Fyri fyrstu ferð verður skipað fyri eini KT-messu í Føroyum. Talan er um eina stórfingna stevnu, har stórst sæð alt, sum hevur við KT at gera í Føroyum er umboðað!**

KT 2002 er býtt upp í tríggjar høvuðspartar. Ein partur verður ein framsýning, har tær luttakandi fyritøkurnar, stovnar, stýrir, v.m. á snotuligum básum koma at sýna fram. Ein annar partur verður ein framløgupartur, har fleiri av teimum luttakandi fyritøkunum í einum show-rúmi koma við áhugaverdum framløgum, og koma m.a. gestir uttan úr heimi at luttaka.

Tann seinasti parturin er skipaður sum ein ráðstevna. Talan verður um sera áhugaverdar fyrilestrar, við fyrilestrarhaldarum bæði uttan úr heimi og úr Føroyum. Sjálvur ráðstevnuparturin verður hildin í Útvarpshøllini, meðan restin gongur fyri seg í Norðurlandahúsinum.

KT 2002 varar í tveir dagar. Tann fyrri dagurin, fríggjadagur 19. apríl, verður skipaður sum ein business to business dagur, og er hesin meira ætlaður til vinnuna sjálva, meðan tann seinni dagurin, leygardagur 20. apríl, er almennur og soleiðis meira ætlaður øllum teimum, sum hava áhuga fyri KT!

Høvið verður soleiðis hesar báðar dagarnar at koma inn í ein annan heim, við tað at størsti denturin kemur at verða lagdur á framtíðina innan KT. Eingin vinna í heiminum broytist og útviklast so skjótt sum KT- vinnan, og vit í Føroyum hava bæði vinnuligt sum politiskt boðað frá, at vit vilja verða við í fremstu røð!

Neyðugt er við tilmelding til tann fyrra dagin. Tilmeldingarfreistin er 12. apríl. Atgongumerki seinna dagin kunnu keypast við dyrnar.

Kostnaðurin fyri tann fyrra dagin er 475,- kr. og er her m.a. íroknað eitt stórfingið kalt borð. Kostnaðurin fyri tann seinna dagin er 80,- kr, men kunnu lesandi koma inn fyri hálvan prís.

Meira kunning um KT 2002 er annars at finna á heimasíðu okkara **www.kt.fo.**

Hava tit okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at venda tykkum til okkara:

KT 2002

KT 2002 · P.O.Box 26 · FO-600 Saltangará · tel. 44 95 91 · fax. 44 95 92 · e-mail: info@kt.fo

FØROYA TELE · formula.fo · FØROYA BANKI · ATLANTIC AIRWAYS